# inum

*Teir báðir, Sveinur Ísheim Tummasson og Dávur Davidsen hava arbeitt í longri tíð við hesi fyrst bókini. Tilfarið er so rúgvusmikið - og Dávur slíkur meistari at fortelja – at teir longu eru komnir hálvavegin við næstu bókini. Hon kemur næsta ár, tá høvuðspersónurin verður 95 ár*

hann upplivdi hana, har hann stóð undiroystur í sjógvi á dekkinum, samstundis sum hann og hinir umborð gjørdu alt fyri at bjarga allari manningini umborð av Blithsome.

”Tað var altíð sagt, at eg var vónarleysur, tí eg óttaðist einki. Men eg var ongantíð bangin umborð á Coraliu, tó at støðan var so ring, ja, sum ikki hugsast kann. Tá tú hevur verið úti fyri nógvum vási, tá venist tú við tað at vera í vandastøðu. Men bangin var eg ongantíð, eg hevði meiri at gera enn so; men eg roknaði ikki við at síggja Føroyar aftur”, greiðir hann frá í bókini.

- Hetta var ein ein verri túrur. Eg dró sjálvur annar



*“Kokkurin var ein spiloppmakari, men vit dugdu sanniliga eisini. Einferð gloymi eg eikki. Hann var so væl tilpasar tað kvøldið. Hann bjóðaði okkum sviskur og rosinur. so grúliga gott lag á honum, tí nú var alt liðugt fyri dagin. Hann varnaðist ikki, at eg ikki var við borðið og át rosinur. Nú skal hann tørna inn. Tá havi eg ligið alla tíðina og krógva meg á fótalagnum. Tá hann leggur seg, nú taki eg fast í beinini á honum. Hann hirdi seg út aftur úr koyggjuni niður á beinki við róp og geyl. Tá helt hann, at eg var ett spøkilsi. So varð rok. Hann legði eftir mær inni í koyggjuni, men so vóru hinir á rygginum á honum. Nei, skjórtan var ongatíð heil hjá honum”.* (bls. 139)

allar menninar frá Blithsome yvir á Coraliu. Tilsamans mundi henda bjargingin taka 4 1/2 tíma, so tú kanst ætla at her stóð nógv á, sigur Dávur.

### Grundin og poengið

Tað hevur verið eitt hestaarbeiði hjá høvundanum at savna alt hetta tilfarið um Dávur saman.

Eitt er at Dávur er ein meistari at greiða frá. Hitt er, at søgan spennir yvir eitt so langt tíðarskeið - heili 94 ár.

Í hesum fyrsta bindinum verður søgan frá føðidegi hansara og fram til 1937 søgd, men nógv annað spennandi liggur og bíðar til næstu bókina.

Trupulleikin – ella avbjóðingin – hjá Sveini hevur verið at halda fast við innihaldið í frásøgnini.

Nógv av tí frásagda byrjar í hesi fyrstu bókini, og endar síðani í øðrum bindi.

- Ja, ein kann siga, at grundin til nógvar av hendingunum í lívinum hjá Dávuri byrja í fyrstu bókini, meðan sjálvt poengið fyrst kemur í næstu bókini, sigur Sveinur.

Fólk kunnu longu nú byrja at gleða seg til ta seinnu bókina. Teir eru í roynd og veru longu farnir undir hana.

Gongst sum ætlað kemur hon út næsta ár, tá Dávur verður 95 ár.

